

*Minst 40 fólk doyðu, tá bumbumenn søktu at irakskum shiamuslimum, sum hildu halgidag í gjár*

# Blóðugur halgidagur

**Minst 75 shiamuslimskir pílagrímar doyðu, tá fleiri bumbur brustu í iraksku býunum Bagdad og Karbala gjáramorgunin**

IRAK
*Árni Joensen*
*fartekst@mail.dk*

Dagurin í gjár var halgidagur hjá shiamuslimunum, og fyri fyrstu ferð í 30 ár kundu shiamuslimarnir í Irak hátíðarhalda dagin, sum var bannaður undir stýrinum hjá Saddam Hussein.

Men hátíðarhaldið fekk ein bráðan enda gjáramorgunin, tá fleiri bumbur brustu í høvuðsstaðnum Bagdad og í Karbala, sum er heilagur staður hjá teimum iraksku shiamuslimunum.

Vesturlendsk tíðindafólk vildu vera við, at minst níggju bumbubrestir vóru at hoyra í Karbala, og at nógv fólk lógu eftirá. Í Bagdad doyðu eisini nógv fólk, og meiri enn 100 vórðu særd. Franska tíðindastovan AFP vildi eisini vera við, at rakettir vórðu skotnar eftir einari mosku í Bagdad.

Í Karbala vóru meiri enn ein millión fólk komin saman at minnast tann heilaga prestin Hussain, sum var abbasonur Muhammed profet, og í Bagdad vóru fleiri túsund shiamuslimar savnaðir við eina mosku. Sambært CNN elvdu bumbuspreingingarnar til ruðuleika, og fólk royndu sum frægast at hjálpa teimum særdu.

Sambært CNN vildu fólk vera við, at tað vóru ikki irakar, men útlendingar, sum høvdu skipað fyri álopunum, sum komu dagin eftir, at irakska stjórnarráðið samdist um eina grundlóg.

# Læra tey ungu at pína og drepa

**Myndugleikarnir í Zimbabwe hava fleiri venjingarlegur, har fleiri túsund ungdómar verða lærd at pína og drepa**

ZIMBABWE
*Árni Joensen*
*fartekst@mail.dk*



Teir zimbabwisku myndugleikarnir siga, at venjingarlegurnar fyrireika tey ungu til ymsar yrkisútbúgvingar, men ungdómar, sum eru rýmdir úr legunum, siga við bretska BBC, at legurnar eru ein liður í einari ætlan hjá Robert Mugabe, forseta at varðveita valdið í landinum.

Seinastu fýra mánaðarnar hava tíðindafólk hjá BBC-sendingini Panorama kanna venjingarlegurnar, og hvat fer fram har. Tíðindafólkini siga, at fleiri av teimum ungu vórðu lærd, hvussu tey skulu pína og drepa mótstøðufólk hjá stjórnini. Tey ungu hava greitt frá, at tey fingu boð um at dylja, hvat fer fram í legunum, og at tey tí ikki tora at greiða almenninginum frá tí.

Samrøður, sum bretsku tíðindafólkini hava havt við tey ungu, benda á, at útbúgvingin byrjar við, at tey ungu verða neyðtikin fyri at bróta teirra mótstøðuevni niður, soleiðis at tey verða lættari at hava við at gera, tá sjálv útbúgvingin byrjar.

# Harward er eisini fyri tey fátæku

**Tann kendi amerikanski lærdi háskúlin Harward vil hava fatur á fleiri lesandi úr teimum lægru stættunum**

ÚTBÚGVING
*Árni Joensen*
*fartekst@mail.dk*

Í framtíðini sleppa foreldur, sum forvinna minni enn 250.000 krónur um árið, frá at gjalda fyri at senda síni børn á tann kenda lærda háskúlan í Massachusetts. Sum er rinda hesi foreldrini góðar 12.000 krónur um árið fyri hvørt barnið, sum verður upptikið á Harward.

Men tað eru ikki bara hesi, sum sleppa bíligari í framtíðini, tí foreldur, sum forvinna ímillum 250.000 og 400.000 krónur, skulu nú rinda einar 7.500 krónur minni fyri at hava eitt barn á tí kenda lærustovninum.

Rektarin á Harward, Lawrence H. Summers, sigur við blaðið Harward Unisersity Gazette, at broytingin í skúlagjaldinum er ein boðskapur um, at tann kendi lærdi háskúlin er ætlaður øllum skikkaðum næmingum, sama hvussu teirra fíggjarliga grundarlag er.

– Mong halda, at hetta er ikki so, men hesa uppfatanina skulu vit broyta, sigur rektarin.

# Lurtar ikki eftir hægstarætti

**Trygdarmúrurin runt um Jerusalem verður bygdur, sjálvt um ísraelski hægstirættur hevur álagt stjórnini at bíða við at byggja hann.**

ÍSRAEL
*Árni Joensen*
*fartekst@mail.dk*

– Trygdargirðingin runt um Jerusalem hevur til endamáls at verja mannalív, og vit fara at fullføra girðingina, áðrenn hetta árið er úti, sigur ísraelski innanríkisráðharrin, Tzahi Hanegbi.

Hetta er beint ímóti einum úrskurði hjá ísraelska hægstarætti, sum í síðstu viku álegði stjórnini at bíða við at byggja ta 42 kilometrar longu trygdargirðininga um Jerusalem. Hægstirættur segði í úrskurðinum, at hann fer fyrst at lurta eftir, hvat fólk í átta palestinskum bygdum við Jerusalem hava at siga um ta ætlaðu girðingina. 30 ísraelsmenn í bygdini Mevassent Tzion hava eisini sent rættinum kæru um ætlanina.

– Girðingin, sum ætlandi skal byggjast á palestinskum lendi, fer at elva til spenning og verður ein hóttan ímóti ísraelsmonnunum, sum búgva í økinum, siga teir 30 ísraelsmenninir millum annað í kæruni.

Shaul Mofaz, verjumálaráðharri, fordømdi sunnudagin avgerðina hjá hægstarætti. Hann segði, at ein og hvør løgfrøðilig seinking fer at geva sjálvmorðsbumbumonnum høvi til at sleppa inn í Ísrael.

ítróttur

Nr. 43 • mikudagur • 3. mars 2004 • 78. árgangur • www.sosialurin.fo

# Sessurin í elitudeildini næstan tryggjaður

**Liðið hjá flogbóltsleikarunum, Bárði Mikkelsen og Ragnari í Haraldsstovu, Holte, hevur nærum tryggjað sær framhaldandi sess í donsku elitudeildini í flogbólti**

FLOGBÓLTUR
*Terji Nielsen*
*terji@sosialurin.fo*

Sigursvanda felagið hjá teimum báðum føroyingunum hevur havt eitt heldur trupult ár, og heldur óvæntað er neyðugt hjá teimum at spæla um at blíva verandi í bestu deildini.

## Vunnu á hinum oddaliðnum

Í teldubrævi úr Danmark greiðir Bárður Mikkelsen frá, hvussu gekst í vikuskiftinum. Holte var á vitjan hjá Hvidovre, og tað gjørdist ein sera spennandi dystur, sum Holte at enda vann 3-2 í settum.

## Ragnar við aftur

Hin føroyingurin í Holte, Ragnar í Haraldsstovu, var við aftur á liðnum, eftir at hann hevur verið darvaður av einum skaða í rygginum í eina tíð. Hóast Holte vann dystin, var avrikið hjá teimum ikki nøktandi, sigur Bárður Mikkelsen úr Danmark.

Dysturin var, sum áðurnevnt sera spennandi, og settúrslitini vóru 25-22, 23-25, 21-25, 25-21 og 15-11,

Holte byrjaði dystin best, men sum fráleið kom Hvidovre inn aftur í dystin, og tað hjálpti ikki um støðuna, at Holte fór at kiksa eina rúgvu av servum, og at verjuspælið hjá liðnum hjá føroyingunum báðum heldur ikki riggaði. Eftir at verða aftan fyri 1-2 í settum, var neyðugt hjá Holte at fáa skil á spælið hjá sær, og við einum góðum stríðsvilja eydnaðist tað teimum at venda dystinum, so at endaliga úrslitið var ein 3-2 sigur til Holte.

Komandi sunnudag fær Holte vitjan av botnliðnum ASV Århus, og vinnur Holte tann dystin, eru teir tryggjaðir sess í donsku elitudeilidini komandi kappingarár.



*Formaðurin í NSÍ, Jákup Mortensen, fegnast um, at Runavíkar kommuna er farin undir at byggja skýli við fótbóltsvøllin í Runavík*

## Amager tapti óvæntað

Eitt annað lið í kvalifikatiónsbólkinum hjá Holte er Amager VK, ið hevur føroyingin Jóhann Nielsen á liðnum. Liðið tapti heldur óvæntað á heimavølli móti botnliðnum ASV Århus í vikuskiftinum, og Amager hevur ongan møguleika at vinna sær sess í elitudeildini til komandi ár. Amager VK liggur nummar fimm í bólkinum við fýra stigum, tvey fleiri enn ASV Århus, sum vann síni fyrstu stig við sigrinum á Amager.

Tveir aðrir av okkara fremstu føroysku flogbóltsleikarum, eru teir báðir Suni Juul Petersen og Steinar Eirikstoft, ið leika við PVC Lyngby. Liðið hjá teimum er í hinum kvalifikatiónsbólkinum til elitudeildina, og sunnudagin høvdu teir vitjan av Århus 1900. Lyngby PVC við báðum føroyingunum á liðnum vann dystin lættliga 3-0. Í løtuni liggur Lyngby nummar trý við tíggju stigum, og ávíkavist fýra og tvey stig eru upp til tey bæði liðini, ið liggja nummar eitt og tvey, og harvið vinna sær sess í bestu deildini. Lyngby PVC hevur tveir dystir eftir at leika,

# Runavíkingar fáa áskoðarapláss við fótbóltsvøllin

**Í Runavík eru teir farnir í gongd við at byggja eitt áskoðaraskýli eystaru megin fótbóltsvøllin.**

ÁSKOÐARAVIÐURSKIFTIR
*Terji Nielsen*
*terji@sosialurin.fo*

Tað hevur leingi verið eitt ynski hjá NSÍ at fáa eitt skýli við fótbóltsvøllin í Runavík. Mangan hevur tað verið rættuliga illfýsið at verið til heimadyst hjá NSÍ, tí vøllurin liggur rættuliga opið fyri, og trupult er hjá trúfastu áskoðarafjøldini hjá NSÍ at finna sær lívd fyri veðrinum.

## 450 sitipláss

Formaðurin í NSÍ, Jákup Mortensen, sigur, at teir fegnast um, at Runavíkar kommuna er farið undir arbeiðið við at gera áskoðaraplássir. Bakkin eystaru megin vøllin er grivin niður, og arbeiðið gongur við fullari ferð, sigur hann. Ikki færri enn 450 sitipláss verða í nýggja skýlinum, og Jákup Mortensen sigur, at hetta fer at bøta munandi um karmarnar hjá fótbóltsáskoðarunum í Runavík. Í fyrstu atløgu verður ikki tekja á skýlinum, men kanska kemur tað einaferð í framtíðini, sigur formaðurin í NSÍ.

*Føroyski landsliðsleikarin í flogbólti, Bárður Mikkelsen, og liðfelagi hansara Suni í Haraldsstovu eru væl ávegis til at tryggja felagi sínum, Holte, enn eitt ár í donsku elitudeildini*



Ein ætlan um stadionøki í Runavík hevur verið til í longri tíð, og Jákup Mortensen sigur ætlanina verða sera góða, og hann heldur somuleiðis, at tað er harðliga tiltrongt, at farið er undir at bøta um viðurskiftini kring vøllin í Runavík.

Umframt nýggja skýli hjá runavíkingum, verður eisini eitt hegn sett upp í norðara enda av vøllinum. Leingi hevur tað verið til fortreð hjá runavíkingum, at bóltarnir eru farnir langa leið, tá ið skotið hevur verið upp á mál í norðara enda av fótbóltsvøllnum í Runavík. Nýggja hegnið, ið er meinlíkt tí við ovara vøll í Gundadali, fer at føra við sær, at skjótari og lættari gongur við at fáa fatur á bóltunum aftur.

# Graslíkisvøllir góðkendir til altjóða dystir

**Altjóða fótbóltssamgongan, FIFA, hevur samtykt at góðkenna teir sonevndu "triðja-ættarliðs" graslíkisvallirnar til altjóða dystir**

ALTJÓÐA FÓTBÓLTUR

Nú verður skjótt møguligt hjá føroyskum feløgum at leika altjóða dystir á sínum vanligu heimavøllum. FIFA samtykti herfyri at geva loyvi til at leika altjóða dystir á graslíki. Ikki allir graslíkisvøllir verða góðkendir, tí talan er bert um teir sonevndu "triðja-ættarliðs" vøllirnar.

Í Føroyum eru tað GÍ, KÍ, ÍF, NSÍ og Skála, ið hava slíkar vøllir, men eisini VB og B68 fáa slíkt graslíki í næstum. At liðini hava slíkar vøllir, merkir tó ikki, at tey uttan víðari kunnu leika sínar altjóða dystir heima, tí aðrar umstøður skulu eisini verða upp á pláss. Til dømis skal eitt ávíst tal av sitiplássum verða til taks. Harafturat er tað bert FIFA, ið hevur góðkent vøllirnar til altjóða dystir, og fyri at føroysk lið kunnu spæla sínar europeisku dystir á hesum vøllum, er neyðugt, at eisini europeiska fótbóltssamgongan UEFA, góðkennir vøllirnar.

Sambært aðalskrivaranum í Fótbóltsambandi Føroya, Ísak Mikladal, kann neyvan væntast, at góðkenningin frá UEFA fyriliggur fyrr enn á sumri 2005. Men tá skuldi so verða møguleiki hjá fleiri føroyskum feløgum at leikt sínar europeisku dystir á sínum vanliga heimavølli.